## Mourinho fær ein verjuleikara

Stórur ófriður hevur seinastu tíðina valdu í enska meistaraliðnum Chelsea, og m.a. hevur ljóðað, at Mourinho ikki verður at finna í Chelsea aftur komandi kappingarár. Nú ræður tó friður aftur á Chelsea-borgini – í øllum førum í eina tíð. Mourinho hevur nevniliga fingið at vita, at hann kann fara at keypa sær ein miðverja. Ovast á listanum stendur Micah Richards hjá Manchester City, men ivasamt er, um Abramovich vil gjalda upphæddina, sum City krevur fyri leikaran .Tal Ben Haim sigst eisini vera á veg til Chelsea, men nú er spurningurin, um Mourinho letur sær lynda við tað næstbesta.

## Enn ein stór uppgáva til Jan

Føroyski altjóða dómarin í flogbólti, Jan Hentze, skal nú aftur av landinum at døma. 17. januar skal hann nevniliga døma altjóða dystin í Top Teams Cup millum finska Rovaniemi og russiska Odintsovo. Talan er um 1/8-finalu í Top Teams Cup, og sostatt er hetta helst størsta altjóða uppgáva hjá Jan Hentze higatil. Tað, sum ger dystin enn meir spennandi fyri Jan, er, at dómaraeygleiðarin til dystin verður ein av mest royndu altjóða dómarunum, sum nú er givin. Eydnast dømingin væl, og finnin gevur sína undirskrift, so manglar Jan bert eina undirskrift fyri at kunnu døma allar dystir á altjóða støði.

Fleyr-ÍF 1-3 (18-25, 17-25, 25-20, 21-25):

# ÍF aftur á odda

**Við sigri á Fleyr í meistaradeildini hjá monnum hevur ÍF endurvunnið oddasessin frá Mjølnir. Sjálvt um Fleyr vann eitt sett, so tóktist ÍF hava tamarhald á dystinum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Við einum sigri á Fleyr eydnaðist monnunum hjá ÍF at endurvinna oddasessin í meistaradeildini, sum Mjølnir hevur havt til láns síðani sigurin á SÍ mitt í síðstu viku*

Fleyr og ÍF hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir í grundspælinum, og í báðum førum vann ÍF tryggan sigur. Undan dystinum lógu fuglfirðingarnir eisini á øðrum plássi við 9 stigum, meðan Fleyr lá á fjórða plássi við 4 stigum, og tí var ÍF greiður favorittur undan dystinum millum liðini bæði í meistaradeildini hjá monnum leygardagin.

### ÍF fekk flúgvandi byrjan

Menninir hjá ÍF livdu eisini upp til rolluna sum favorittar í fyrsta setti. Teir løgdu hart út og vunnu sær eisini eina leiðslu tíðliga í settinum. Út á settið gjørdist greitt, at ÍF fór at vera oman á í fyrsta setti, og at enda megnaðu fuglfirðingarnir eisini at vinna hetta rættiliga trygt, 25-18. Her var eingin sum helst ivi um, at ÍF var betra liðið.

Í øðrum setti helt ÍF fram, har teir høvdu slept í fyrsta. Enn einaferð løgdu teir hart út, og Fleyr kom sum so slett ikki við í dystin í hesum báðum fyrstu settunum. ÍF setti seg eisini á dystin frá byrjan av øðrum setti, og sum hetta settið leið, øktist munurin bara millum liðini. At enda megnaði ÍF eisini at vinna annað sett rættiliga trygt, 25-17, og nú sá ikki gott út hjá Fleyr, sum skuldi vinna restina av settunum fyri at hava nakran møguleika at vinna dystin.

### Fleyr vildi spæla við

Í triðja setti tóktust leikararnir hjá Fleyr at vera heldur meir uppsettir. Teir vóru nógv betri við í hesum settinum, og út á settið sást týðiliga, at her fór Fleyr at vera oman á. Tað eydnaðist eisini hjá teimum at vinna 25-20, so nú var dysturin aftur púra opin.

### ÍF endurvann oddasessin

Í fjórða setti var gongdin tó aftur vend. Nú vóru leikararnir hjá ÍF aftur nógv meir klárir til uppgávurnar á vøllinum, og teir fingu eisini betur fatur á Fleyr í hesum settinum. Fleyr royndi tó at hanga í av øllum alvi, men at enda gjørdust teir tó ov stuttir. ÍF vann eisini fjórða settið, 25-21, og sostatt vann liðið úr Fuglafirði dystin 3-1.

Við sigrinum hevur ÍF endurvunnið oddasessin frá Mjølni, sum hevur havt hann til láns síðani sigurin á SÍ mikukvøldið. Munurin á ÍF og Mjølni er tó bert tað eina stigið, og meistaraheitið tykist skulu avgerðast ímillum hesi bæði liðini.

StÍF-VB 21 - 37 (10 - 16):

# Stórsigur til VB

**Royndu leikararnir hjá VB prógvaðust at vera ein alt ov stórur biti hjá ungu leikarunum hjá StÍF. VB vann við nærum tvífalt so nógvum málum sum StÍF**

HONDBÓLTUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sunnudagin hittust kvinnurnar hjá StÍF og VB á Skála. Kvinnurnar úr Vági vóru greiðir favorittar frammanundan, og tær livdu eisini upp til vónirnar. Tað fóru nevniliga suður aftur við tveimum stigum og stórsigri í viðføringum.

Munurin á liðunum sást beinanvegin. VB dróg frá, og tær hugdu ikki afturum seg. Royndu leikararnir hjá VB vóru betri enn ungu óroyndu leikararnir hjá StÍF hendan dagin.

### Svava toppskjúti

Daiva var aftur sera góð fyri VB. Hon skeyt nógv mál. Málverjin Asta stóð seg eisini sera væl.

Svava Vestergaard hjá VB spældi ein sera góðan dyst og gjørdist toppskjúti við 11 málum.

StÍF hevur sera ungar evnaríkar leikarar, sum tó enn mangla royndir. Síðstu løtuna stillaðu tær við einum liði, sum tað sama kundi spælt í kappingini fyri kvinnuunglingar, tí at miðalaldurin var so lágur.

Hóast VB var nógv betri enn StÍF sunnudagin, so kunnu ungu leikararnir hjá StÍF hava eina góða framtíð, um tær framvegis verða hildnar til.

Tær tykjast enn at vera smædnar, tá ið tær skjóta, og tí møtti málverjin hjá VB nógvum skotum, sum vóru hálvvánalig.

### Ninna best hjá StÍF

Einasti leikari hjá StÍF, sum veruliga spældi upp til VB leikararnar, var Ninna Johansen, sum vísti sjálvsálit til at bróta ígjøgnum og skjóta upp í hornini.

Tað sær nú gott út hjá VB, men tær koma at møta torførari mótstøðu enn sunnudagin. Móti endanum av dystinum sunnudagin slakkaðu tær nógv av og mistu bóltin alt ov lætt. Hetta hava tær ikki ráð til, tá ið tær møta Neistanum ella Stjørnuni. Men VB hevur gott fólk, og við einari væl leikandi Daivu kunnu tær vinna á øllum.

StÍF stríðist í botninum, og tær kunnu helst ikki gera sær vónir um at fáa nakað serligt burturúr kappingarárinum. Tær skulu heldur líta frameftir og halda á at menna ungu leikararnar, so at tær kunnu bjóða teimum stóru av um nøkur ár.

### FAKTA

**Málskjúttar:**
**StÍF:** Ninna Johansen 7, Rebekka Justinussen 7, Fríðrún Danielsen 2, Sólfríð Christiansen 1, Anna B. Danielsen 1
**VB:** Svava Vestergaard 11, Daiva Tuomaite 8, Teresa Joensen 6, Laila Jespersen 4, Ivana Ljubicic 3, Jona Thorsteinsson 2, Ruth Lisberg 1, Una Egilsdóttir 1, Asta Armonaviciute 1
**Útvísingar:** StÍF 1, VB 2

# Milla var størstur

**Maðurin, sum tók lut í HM-endaspølunum í '82, '90 og '94, er nú kosin sum besti afrikanski spælarin í søguni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Afrikanska fótbóltssamgongan hevur nú kosið besta afrikanska spælaran seinastu 50 árini. Onkur hevði kanska roknað við, at menn sum Eto'o, Weah, Essien og Drogba kappaðust um fremsta plásið, men hetta fall ístaðin til Roger Milla úr Cameroun. Milla spældi á yrkisleið síni við feløgum í Grikkalandi, Sveis og Fraklandi, og skeyt hann ikki færri enn 450 mál tilsamans. Tað var tó serliga á landsliðnum, at hann gjørdi um seg. Ikki minst, tá hann sum 38 ára gamal var lyklaspælarin á liðnum, sum var heilt nær eini hálvfinalu móti Týsklandi. Milla var tá annars givin við fótbóltinum, men hóast hann bert orkaði at spæla hálvan tíma, tá endaspælið byrjaði, so gjørdist hann við fýra kmálum toppskjútti hjá Cameroun í kappingini. Ikki minst var málið móti Colombia í 1/8-finaluni minniligt. Hetta var, tá hann tacklaði show-málverjan Rene Higuita uppi á miðum vølli, fyri síðani stórflennandi at senda bóltin í tóma netið. Og so var tað sjálvandi enn einaferð tíð til eyðkenda Milla-wiggle við hornaflaggið.

Og í USA í 1994 var Milla eisini við. Hesa ferð gjørdist hann eisini elsti málskjúttin í HM-søguni, tá hann skeyt troystarmálið í 6-1 tapinum móti Russlandi. Ein dystur, har russiski Oleg Salenko annars eisini skrivaði seg í HM-søguna, tá hann skeyt fimm av russisku málunum.

Umframt HM-fótbólt og fótbólt við ymsum europiskum feløgum, var Milla eisini við til at vinna 14 meistaraheiti í Egyptalandi og trý African Nations heiti.



*Málið í sigrinum á Columbia var kanska tað kendasta av øllum hjá Roger Milla*